Barca feiraði meistarheitið við tapi

Leygarkvøldið gjørdist tað greitt, at Barcelona er spanskur meistari í fótbólti. Tað tapti Real Madrid ímóti Villareal, og so var greitt, at eingin kundi fáa Barcelona aftur. Í gjárkvøldið spældi Barcelona ímóti Mallorca, og tað endaði við 2-1 sigri til Mallorca – men tað broytir einki við veruleikan, at Barcelona er meistari í Spania í ár.

Popczynski tapti 0-7

Aarhus Fremad fekk av at vita, tá liðið vitjað FC Fyn í donsku 2. Deild vestur í gjár. FC Fyn roynir at vinna uppflyting til næstbestu deildina, og tað gekk hesaferð út yvir liðið hjá Krzystof Popczynski. FC Fyn vann ikki minni enn 7-0 ímóti Aarhus Fremad. Støðan í hálvleikunm var 2-0, og í seinna hálvleiki økti FC Fyn fimm ferðir um leiðsluna.

KÍ – 07 Vestur 2-2 (2-2):

Tey vóru vónbrotin í Klaksvík

Talan var ikki um teir heilt nógvu møguleikarnar, tá KÍ tók ímóti 07 Vestur sunnudagin
Mynd: Álvur Haraldsen

KÍ

07 Vestur

Hóast Kristoffur Jakobsen við tveimum málum hevði skotið klaksvíkingar á sigurskós, eydnaðist tað ikki KÍ at fáa fyrsta sigurin til høldar á heimavølli móti 07 Vestur í gjár. Klaksvíkingar, sum eru tolnir og stuðlandi, fóru vónbrotnir til hús

FÓTBÓLTUR

Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo

Klaksvíkingar skunda sær burtur frá Injector Arena. Frá kuldanum, vindinum og regninum. Frá tí eina stiginum, sum verður verandi í Klaksvíkini. Frá einum keðiligum fótbóltsdysti, sum einu løtuna líktist besta seinnapartinum hjá unga KÍ-liðnum í hesum kappingarárinum. Onkur finnur sær tó tíð at festa sær í, meðan onnur fara tvísporandi út í bilin. Teir skunda sær burtur frá enn einum vónbroti við Djúpumýru.

Fótbóltslagið er alt annað enn gott í Klaksvík í løtuni. Hóast fólk hava tol við unga liðnum, ræðast tey stigtalvuna. Klaksvíkar Ítróttarfelag liggur til niðurflyting.

Tey vóru annars glað...

Á áskoðaraplássunum høvdu tey annars av álvara fingið hitan í seg, tá klokkan var 15.20. Tá høvdu klaksvíkingar reist seg úr stólinum fyri aðru ferð at feiðra sínum leikarum. Kristoffur Jakobsen hevði fyrstu løtuna skotið heimaliðið á sigurskós. Eftir trimum minuttum var hann fyrstur á, tá gestirnir ikki vóru nóg avgjørdir í brotsteiginum. Og løtu seinni var hann púra kølin í kuldanum, tá hann einsamallur við Trygva Askham, lyfti upp um málverjan.

Áskoðararnir hómaðu fyrsta sigurin av týdningi í hesum árinum. Men tað broytti ein 41 ára gamal miðvingur skjótt...

Tað ber ikki til?!

Jens Erik Rasmussen hevur av álvara gjørt um seg, nú hann aftur roynir seg í fremstu røð. 40 ára gamli miðvallarin var aftur í gjár millum teir mest eyðsýndu hjá 07 Vestur, og tað var serliga við tveimum málum, at hann gjørdi bart.

Fyrst var Rasmussen tryggur úr ellivu metrum, eftir at Milan Pejcic var rendur um koll í brotssteiginum. Og á hálva tímanum javnaði hann við frísparki úr høgru, sum helst var ætlað sum innlegg, úr 30 metra fjarstøðu.

- Tað ber ikki til! Galið, kom nú!, ljóðaðu flestu orðini úr skýlinum, tá bóltur hevði ferðast millum vinir og fíggindar, og í netið handan Jákup Mikkelsen.

Hvørgin royndi

KÍ hevði viðvind eftir hvíldina. Heimaliðið, sum legði sera bragdliga fyri, tóktist skelkað eftir útjavnandi málið hjá Jens Eriki Rasmussen. Klaksvíkingar fingu ongantíð fótin fyri seg, og í framrættaða spælinum løgdu teir lítið fyri eftir steðgin. Einasta veruliga málmøguleikan hevði Ivan Joensen í seinasta minuttinum av vanligu leiktíðin, tá innskiftarin stóð væl fyri í feltinum. Men einsamallur við Trygva Askham, vardi málverjin fyri.

Vágamenninir vóru nøgdir við eitt stig. Piotr Krakowski, venjari, vildi ikki satsa í óttanum fyri, at tað fór at kosta í hinum endanum. Og eitt stig í Klaksvík er eisini nøktandi hjá uppflytarunum, hóast tað ikki lyftir liðið upp um niðurflytingarstrikuna í stundini.

Milan Pejcic og Jens Erik Rasmussen stóð fyri tí skipaða spælinum á miðvøllinum. Báðir stóðu seg væl, men hóast tað sjáldan førdi møguleika við sær, fluttu teir bóltin í løtum væl. Sum dysturin leið móti endanum, gjørdist spælið hjá báðum liðum meira tilvildarligt, har vindurin eisini hevði sína ávirkan.

Framvegis góð tíð

Klaksvíkingar liva framvegis í vónini. Framvegis er so lítið fráliðið av kappingarárinum, at tú kann tosa um niðurflytingarvanda. Men tað er einki at ivast í, at stigini skulu skjótt fáast til høldar. Liðið hevur, sum væntað, stór sveiggj í sínum avrikum, og tað verður góðtikið í Klaksvík. Ungu leikararnir gera framgongd, og við áhaldandi treiskni og dirvi skulu stigini helst koma undir land. Men tíðin byrjar so smátt at renna undan.

07 Vestur hevur higartil vunnið sær seks stig, sum er eitt færri enn ÍF á áttanda plássinum. Vágamenn hava í løtum víst frálíkt spæl, og í fleiri førum verða teir torførir at syfta. Tað er serliga á heimavøllinum, at liðið skal vinna stigini, meðan øll stig á útivølli er kærkomin. Í gjár fingu teir eitt í Klaksvík, og tað var eftir umstøðunum nøktandi.

Vildu ikki satsa

Piotr Krakowski, venjari hjá 07 Vestur, var nøgdur við eina stigi, sum hann og leikararnir fingu í Klaksvík í gjár.

- Hóast stóran mótburð, halda vit fram at stríðast, og tað gav úrslit. Í hálvleikinum tosa vit um at verða væl skipaðir í verjupartinum, og tað vóru vit eisini.

KÍ reistist ongantíð aftur, eftir at tit javnaðu. Hví valdu tit ikki at leggja meira fyri í framrættaða spælinum móti skelkaðu klaksvíksingunum?

- Tað var einki fótbóltsveður í dag, og tað vóru fleiri tilvildarligar støður. Javnleikur í Klaksvík er eitt gott úrslit. Vit vildu ikki satsa, um tað nú kostaði í hinum endanum. Vit valdu tað tryggu loysnina, og eru glaðir fyri stigið, sigur Piotr Krakowski, sum hevði vónað, at 07 Vestur hevði havt fleiri stig fyrstu sjey dystirnar.

-uni

Stigini koma skjótt

- Vit eru glaðir fyri stigi, men vildu sjálvandi væl heldur ynskt øll trý.

Jákup Mikkelsen harmast sjálvsagt um, at tað ikki eydnaðist KÍ at fáa fult á heimavølli móti uppflytarunum úr 07 Vestur í gjár. Málverjin staðfestir, at brotssparkið, sum gestirnir fingu miðskeiðis í fyrra hálvleiki, hevði stóra ávirkan á dystin.

- Vit leggja bragdliga fyri, men tá teir fáa eitt heldur lætt mál, tykjast tað, sum fjáltur kemur á okkum. Uppleggið í dag var væl meira framrættað enn vanligt, men vit hava trupulleikar við at spæla okkum til møguleikar.

Tit hava framvegis fyrsta sigurin í 2009 til góðar. Hvussu er at spæla fótbólt í Klaksvík í hesum døgum?

- Tað er sjálvandi stuttligt. Tað er tí, at vit spæla fótbólt. Vit hava gjørt stóra framgongd, og eg eri vísur í, at stigini ikki eru langt burturi, sigur Jákup Mikkelsen, venjari og málverji hjá KÍ.

-uni